# Kili keypir

Herfyri fór Christian í Grótinum til Kili, og nú skrivar FiskeribladetFiskaren, at eitt felag ím Kili hevur keypt uppisjóvartrolaran Margiris, sum er frystitrolari, og sum reiðaríið Parlevliet & Van der Plas eigur. Skipið, sum hevur verið skrásett í Litava, hevur ligið í Imuiden, har ymsar umvælingar og ábøtur eru gjørdar. Tað arbeiðið er liðugt, og Margiris er nú á veg til Kili. Tað vanliga er, at skip, sum sigla millum Evropa og Kili, fara ígjøgnum Panamaveitina, men Margiris fer fyrst til Rio de Janeiro í Brasil og haðani ígjøgnum Magellansundið til Kili. Harvið sleppur reiðaríið frá at rinda fyri at sigla ígjøgnum Panamaveitina. Hinvegin er teinurin longri.



# Meiri toskur í Norðsjónum

Toskastovnurin í Norðsjónum hevur ment seg so nógv, at gýtingarstovnurin er metstórur, og sum heild er stovnurin oman fyri meðalstøddina. Tað sigur ICES, sum tí mælir til at hækka toskakvotuna næsta ár. Tilmælið hjá ICES fyri árið í ár er 473.000 tons, men politikararnir samdust um at loyva skipum og bátum at veiða 525.000 tons. Tað hevur eftir øllum at døma ikki havt stórvegis ávirkan á stovnin, tí nú mælir ICES til, at kvotan næsta ár verður 577.500 tons. ICES sigur í tilmælinum til tann politiska myndugleikan, at verandi toskafiskiskapur í Norðsjónum er burðardyggur, og at stovnurin mennist.

# ...ndað av øðrum túri

vík í gjár. Teir høvdu ávikavist 380 og 400 kassar á 48 kilo hvør.

Pól Fuglø, landingarformaður, veit ikki at siga, um onnur skip koma inn at landa hesa vikuna, men lítið bendir á, at talan verður um tað heilt stóra, nú línuskipini nýliga eru farin útaftur.

### Lítið útróður – vánaligir prísir

Útróðrarbátarnir í Klaksvík leggja vanliga veiðina upp á Kósini, har Landingarmiðstøðin tekur ímóti.

Men Pól heldur ikki, at tað hevur verið nakar serligur útróður at tosa um í seinastuni. Lítið er eisini frætt um hvíting, hóast hetta skuldi verið tíðin til hetta fiskaslag.

– Eg haldi, at summir bátar eru lidnir við sínar fiskidagar. Sum heild, haldi eg, at árið hevur roynst smáligt hjá útróðrarbátunum í síni heild.

Eitt, sum hevur fylt nógv hjá útróðrarmonnum í longri tíð, er vánaligi fiskaprísurin á hýsu og toski.

– Prísirnir á hýsu eru slett einki at tosa um, men prísirnir á toski eru kvinkaðir nakað uppeftir aftur. Tað er greitt, at fiskaprísurin hevur verið lágur hjá teimum, sum skulu fiska og fáa lønandi vinnu úr útróðri, sigur Pól Fuglø, landingarformaður.




Tummas Christophersen, reiðari, sigur, at í Peeterhead er frystigoymsla, sum megnar at frysta heili 1100 tons um samdøgnið.

– Skipini hjá okkum hava landað tríggjar túrar í Skotlandi, og hesar túrarnar hevur veiðan ligið millum 480 upp í 614 tons hvønn túrin.

Hann sigur, at prísirnir fyri gulllaksin hava verið heldur betri í Skotlandi enn í Føroyum.

– Vit hava fingið 3,60 krónur fyri kilo í Peeterhead, meðan gulllaksaprísurin í Føroyum hevur ligið á 3,25 krónur fyri kilo.

Reiðarin sigur, at hesi oyruni meira fyri kilo sjálvandi eru munagóð, men hann ivast kortini í, um skipini høvdu farið av landinum við fiskinum, um møgleikar vóru at selt veiðina í Føroyum.

– Síðan okkara skip fóru á gulllaksaveiði í apríl, hava tey landað einar tveir ella tríggjar túrar í Føroyum. Hesin seinasti túrurin av trimum, sum tey hava landað uttanlands, byrjaði aftur í gjárkvøldið, og í løtuni veit eg ikki at siga, hvar skipini fara at landa, tá hesin túrur er lokin um nakrar dagar, sigur Tummas Christophersen.

Manningarnar á Vestmenningi og Fram skifta triðja hvønn túr í staðin fyri annan hvønn túr, nú landað hevur verið í Skotlandi.

Sum sæst í aðrari grein á hesi opnu í dag, landaðu Eysturbúgvin og Vesturbúgvin stívliga 500.000 pund av gulllaksi í Saltangará í gjár, og bæði 1. juni og 5. juni vóru Polarhav og Stjørnan eisini fullfermdir í Saltangará.

Hesar báðar túrarnar høvdu leirvíkstrolararnir væl meira en 500.000 pund hvønn túrin.



*Gulllaksaveiðan er sera góð, og upsaveiðan roynist framvegis væl. Hvørja viku kemur nógvur fiskur upp á land á landingarmiðstøðini hjá Beta í Saltangará*

# Upsi og gulllaksur í stórum tonsatali

**Tað gongur væl hjá gulllaksaskipunum, og upsaveiðan er eisini góð. Hetta gevur nógvar landingar og nógv fiskaarbeiði, har fiskurin kemur til virkingar**

LANDINGAR
*Orð og mynd:*
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Gulllaksaveiðan var sera góð í longu vertíðini í fjør summar, og einki er, sum bendir á, at veiðan verður minni í vertíðini, sum byrjaði uppaftur fyrr í ár enn í fjør.

Tað tók sína tíð, áðrenn Eysturbúgvin og Vesturbúgvin vóru klárir at loysa í vertíðini í fjør, og uppundir vertíðina í ár skiftu Vestmenningur og Fram motor.

Samanumtikið komu tey seks skipini, sum vanliga eru á gulllaksaveiði í summarhálvuni, fyrr í gongd í ár og við teirri veiði, sum verið hevur síðan vertíðin byrjaði, er væntandi, at gulllaksaárið í ár ikki fer at roynast minni væl hjá skipunum, enn tað royndist í fjør.

Tey seks skipini, sum eru á gulllaksaveiði, eru Vestmenningur og Fram, Eysturbúgvin og Vesturbúgvin og leirvíkstrolararnir, Stjørnan og Polarhav.

Sum skilst, hava Vestmenningur og Fram havt onkra góða sølu í Skotlandi, og ætlanin er, sum vit eisini hava skilt, at skipini skulu landa í Skotlandi nakrar túrar í slag, áðrenn tey leggja veiðina uppaftur í Føroyum.

### Stórar lastir

Í gjár landaðu Eysturbúgvin og Vesturbúgvin stívliga 500.000 pund av gulllaksi í Saltangará, og bæði 1. juni og 5. juni vóru Polarhav og Stjørnan eisini fullfermdir í Saltangará. Hesar báðar túrarnar høvdu leirvíkstrolararnir væl meira en 500.000 pund hvønn túrin.

Hetta má sigast at vera sera góð veiða hjá gulllaksaskipunum.

Nú svartkjaftakvotan er so lítil, og veiðan eftir svartkjafti í føroyskum sjógvi soleiðis eisini hevur verið avmarkað í hesum árinum, halda menn, at hetta hevur verið viðvirkandi til, at fiskiskapurin eftir gulllaksi hevur verið uppaftur betri.

Tað er altíð trupult at tosa um hjáveiði hjá pelagisku skipunum, tí her gerst tú sjáldan klókari, um tú spyrt, men Sosialurin hevur skilt á monnum, at viðhvørt er stór íblanding av gulllaksi uppi í svartkjaftaveiðini.

### Góð upsaveiða

Men tað er ikki bara gulllaksaveiðan sum er góð í løtuni. Upsaveiðan roynist framvegis holl og altavgerandi hjá partrolarunum.

Heykur og Falkur landa í Saltangará í dag, og á landingarmiðstøðini hjá Beta siga tey, at veiðan hjá teimum hendan túrin liggur um 360.000 pund. Sum skilst, liggur miðalprísurin á upsa í løtuni um slakar 5 krónur fyri kilo – alt eftir støddini á fiskinum.

Á Beta vænta tey Jaspis og Ametyst um fáar dagar, helst seinni í hesi vikuni. Í løtuni eru teir hálvfullir.

Stelkur og Bakur eru úti, og í gjár loystu eisini Rókur og Lerkur, sum hava ligið í umleið eina viku vegna ymiskar ábøtur.

Línuskipið Váðasteinur hevur eisini landað í Saltangará hesa vikuna. Teir høvdu stívliga 50.000 pund. Meginparturin av veiðini var longa og brosma. Teir fingu í miðal einar 4,80 krónur fyri kilo av brosmu og umleið 7,80 fyri kilo av longu.